KT-vinnupolitikkur

# KT-vinnupolitikkur

## Uppskot frá landsstýrismanninum í vinnumálum

FØROYA LANDSSTÝRI

Vinnumálastýrið

november 2001



# KT-vinnupolitikkur

Uppskot frá landsstýrismanninum í vinnumálum

Vinnumálastýrið

november 2001





# Innihaldsyvirlit


Fororð. . . . . . . . . . . . . . . . . 6

Hugsjón . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8

Støðan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9

Leikluturin hjá landsstýrinum . . . . . . . . . . 9

Førleikamenning og gransking . . . . . . . . . . . 11

Fíggingarmøguleikar og skattaviðurskifti . . . . . . 15

Fjarskifti og undirstøðukervi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20

Netverksskipanir og marknaðarføring uttanlands. . . . . . . . . . 27

Almenna KT-nýtslan og lóggáva . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 29

Hagtøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 33



# Fororð

Vitanarsamfelag[1], kunningartøkni[2] og altjóðagering eru hugtøk, sum verða brúkt hvørt um annað og mangan tykjast ókunnig og óviðkomandi. Kortini er ein grundbroyting hend um allan heim, sum ávirkar einstaklingin, virki, skúla, bygd o.s.fr.

Í altjóðabúskapinum ber til at flyta kapital; tøkni fer skjótt víða um, og handilsvirksemi flytist skjótt og lættliga millum øki. Kunningartøknin tekur seg fram í hvørjum og ávirkar og styðjar upp undir altjóðagering og ta samfelagsmenning, sum fer fram í Føroyum og úti í heimi. Kunningartøknin ger, at heimurin fyri okkum minkar. Íløgur í kunningartøkni hava ment bæði almenna fyrisiting og vinnulív í Føroyum og í flestu lond í heiminum.

Tann økta altjóða kappingin setur krøv til føroyingar at skapa karmar um eitt vinnulív, sum ger vørur og tænastur, ið byggja á førleika og vitan. Føroyska vinnulívið eigur alla tíðina at brúka teir møguleikar, ið kunningartøknin gevur í vinnu síni, og støðugt at meta samband millum arbeiðslag og kunningartøkni. Teir samskiftismøguleikar, ið kunningartøknin gevur, hava skapt fortreytir fyri, at handilsliga virðisøkingarketan[3] kann verða sett í eina altjóðaskipan, soleiðis at virki tvørtur um landamørk kunnu samstarva um at gera og selja vørur og tænastur. Teir kappingarligu vansarnir, sum tarna teimum hevdbundnu vinnugreinunum í Føroyum, t.d. tað, at langt er á høvuðsmarknaðirnar, og at virkini upp á seg eru smá, gera ongan mun, tá ið vit tosa um KT-vinnu. Smá virki her um okkara leiðir hava eins góðar møguleikar at gera vart við seg sum stór virki á meginlandinum. Tøknimenningin skapar sostatt góðar fortreytir fyri vinnu, sum er í landinum, og fyri at menna KT-vinnu í Føroyum.

---

[1]Vitanarsamfelag er heiti á eini samfelagsskipan, har vitan er megintilfeingi og grundarlag undir búskaparligum vøkstri. Í vitanarsamfelagnum er vitan týdningarmeiri enn vanligu málini fyri kappingarføri sum arbeiðslønir, tilfeingi og undirstøðukervi.

[2]Kunningartøknivinna merkir - í hesum samanhangi - vinna, ið virkar í kunningar- og fjarskiftistøkni. Talan er um tólbúnað, forrit og tænastur, umframt fjarskiftisútbúnað og tænastur. Kunningartøkni er eitt felagsheiti, serliga um alla erravmagnstøkni (mikroelektrisk baserede teknologier), sum brúkt verður at savna, viðgera, flyta talað, myndað og skrivað upplýsingartilfar.

[3]Virðisøkingarketan merkir her virðisøkingin, sum fer fram í einum vinnumenningarumfari frá hugskoti, til frumeintakið er ment, til framleiðslu, marknaðarføring og sølu.



Á okkara døgum er tað viðurkent um allan heim, hvussu umráðandi vitan er til at útvega sær kappingarfyrimunir, sama hvat vinnuvirksemi talan er um. Tískil er tað at handfara vitan, m.a. við kunningartøkni sum amboði, ein avbjóðing, ið føroyska samfelagið og føroyska vinnulívið eiga at taka ímóti.

Kunningartøkni broytir ikki bert tær vinnuligu umstøðurnar, men er eisini ein búskaparlig og sosial megi, sum broytir samfelagið í síni heild. Hóast ymiskt er, hvussu kunningartøkni ávirkar samfelagið, er endamálið við hesum riti kortini at vísa á endamál við og vegir til at fáa í lag ein føroyskan kunningartøkni-vinnupolitikk.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum legði eitt uppskot til vinnupolitikk fyri løgtingið í mars 1999. Sum ein liður í tí framhaldandi arbeiðinum við vinnupolitikkinum varð m.a. skotið upp, at stevnumið skulu verða orðað fyri hvørja vinnugrein sær. Vinnupolitikkurin skal tryggja, at samanhang er í ætlanunum fyri tær ymsu vinnugreinirnar. Í ætlanum, sum gjørdar verða fyri tær einstøku vinnugreinirnar, skal farast meira í smálutir at viðgera tey evni, ið eru viðkomandi fyri ta ávísu vinnugreinina.

Vinnupolitikkurin hjá Føroya landsstýri setur stevnumið fyri føroyska vinnu og búskap. Eins og vinnupolitikkurin er KT-vinnupolitikkurin ein regla, sum Føroya landsstýri miðar seg eftir í sínum dagliga arbeiði, t.d. tá ið ítøkiligar politiskar ætlanir skulu verða gjørdar í sambandi við vinnuna. Ætlanin er, at KT-vinnupolitikkurin, so hvørt tørvur er á tí, skal endurskoðast og lagast eftir broyttum umstøðum og teimum avbjóðingum, sum taka seg upp í hesi vinnugrein.

KT-vinnupolitikkur krevur virkið orðaskifti, virkisfýsni – og samstarvsvilja.

Bjarni Djurholm
landsstýrismaður í vinnumálum



# Hugsjón

KT-vinnupolitikkurin skal verða orðaður eftir hugsjónini í tí samtykta vinnupolitikkinum, t.e., at politikkurin krevur at stuðla uppundir ein sjálvberandi búskap, ið gevur avlop og fremur framburð og vælferð í frælsari, altjóðakapping. Í vinnupolitikkinum skulu trivnaður og umhvørvi eisini verða raðfest ovarlaga.

Hugsjónin fyri KT- vinnupolitikkinum er tí orðað soleiðis:
***Sum ein liður í at fjøltátta føroyskan búskap skal KT-vinna vera ein fíggjarlig sjálvberandi vinna, ið er grundarlag undir at menna, virka og selja dygdarvøru og tænastur á føroyska marknaðinum og til útflutnings, og sum skapar avkast í fríari altjóðakapping. Til tess at stuðla hesi framhaldandi menning eigur tað almenna at ganga á odda at nýta kunningartøkni.***

Skal KT-vinnan standa seg í altjóðakapping og skapa framburð í samfelagnum, má hon vera endurnýggingarfør, hava dagførda vitan og fjøltáttað samskifti. Samstundis má hon ganga undir tey krøv, samfelagið setur viðvíkjandi umhvørvi og trivnaði.

KT-vinnan skal allar vegir viðvíkjandi hugsjónini sjálv skipa síni viðurskifti, bæði fíggjarliga og hvat menning, vinnu og útflutningi viðvíkur innan teir karmar, ið tað almenna setur.

Menningarlond eru eyðkend av, at tilfeingisvinnan er álitið hjá teimum, og tey hava lutfalsligan lítlan virðisvøkstur borin saman við lond, har búskapurin byggir á vinnu og serliga tænastuvinnu. Í tænastuvinnuni er menningin knýtt at vitanarsamfelagnum, sum er samfelagið, har tað at menna og nýta vitan og tøkni er avgerandi fyri vøkstur og vælferð. Hvussu stóran týdning vitan og tøkni hava, sæst ógvuliga væl, verður hugt at, hvussu stórar íløgur lond gera í útbúgving, gransking og nýggja tøkni.

Fyri at draga bestu fólkini til sín er eisini neyðugt at hava fyri eyga, at vinnan eins og samfelagið sum heild kunnu bjóða góð lívskor og mennandi og tryggar karmar.



Skulu Føroyar menna KT-vinnu, so má ásurin, sum alt melur um, vera: hugflog, áræði, tillagingarevni, útbúgving, førleiki, framtak og menning.

## Støðan

KT-vinnan er ein av vinnugreinunum, sum veksur skjótast í heiminum nú. KT-vinnan er eyðmerkt við bæði stórum váða og við møguleikanum fyri stórum virðisvøkstri. Umframt at kunningartøkni kann gera vinnur, sum eru úrtøkubetri, eru eisini útlit fyri, at útfluttar KT-vørur og tænastur kunnu skapa meiri virði í samfelagnum. Ísrael, Finnland og Írland eru dømi um lond, sum áður vóru hátøknilig menningarlond, men sum við at føra ein miðvísan KT-vinnupolitikk og við at gera tær íløgur og broytingar, sum krevjast, nú eru komin millum fremstu KT-tjóðir í heiminum (sí í hesum viðfangi www.vms.fo ferðafrágreiðing: »KT-vinnupolitikkur í Ísrael«).

Í løtuni útvegar føroyska KT-vinnan KT-vørur og KT-tænastur til heimamarknaðin. Eginmenning við KT-vørum og KT-tænastum eru í støðugum vøkstri, og nøkur virki flyta út KT, og onnur eru komin áleiðis við ætlanum, sum miða eftir útflutningi.

Sum dømi um útflutningsvørur og tænastur í KT kann verða nevnd skipan, sum verður nýtt at skráseta, skjalfesta og at kanna medico-tøkniútgerð til sjúkrahús, veddingarskipan, dátugrunnar og heimasíðuskipanir. Føroyskar fyritøkur hava eisini ment og flutt út framkomnar KT-skipanir til fiskivinnu og alivinnu.

## Leikluturin hjá landsstýrinum

Leikluturin hjá tí almenna er í broyting. Tað almenna er ikki so nógv sum fyrr ein stýrandi partur í samfelagnum. Tað gongur ímóti sundurskipan og frælsari kapping. Tað almenna setur ikki longur í gongd, men leggur í staðin viðurskift-



ini til rættis soleiðis, at tann váðafúsi íleggjarin fær góðar umstøður at arbeiða undir, men sjálvur má taka ábyrgd av sínum viðurskiftum.

Skal nakar møguleiki vera at røkka á mál við setninginum, krevur eitt miðvíst arbeiði at verða gjørt, so at karmarnir, sum settir verða um vinnuna, eru so góðir sum gjørligt. Í samstarvi við vinnuna leggur landsstýrið serligan dent á at menna karmarnar um:

• KT-arbeiðsmegi og gransking
• fíggingarmøguleikar og skattaviðurskifti
• fjarskifti og undirstøðukervi[4]
• netverksskipanir og marknaðarføring uttanlands
• almennu KT-nýtsluna og lóggávu

Neyðugt er at seta sær greið mál á hvørjum av hesum økjum, og samstundis vísa á gongdar leiðir at hesum málum. Ikki minni týdningarmikið er tað, at tiltøk og førdi politikkurin sum heild verða eftirmett.

Tey fimm økini, nevnd omanfyri, verða viðgjørd gjøllari, og víst verður bæði á hvørji endamál, ið sett eiga at verða á hesum økjum, og vegir til at menna karmarnar um tey. Miðast skal eftir, at røtt endamál og vegir at røkka málinum verða sett fyri KT-vinnupolitikkin, gongdar leiðir funnar, og at allir partar hava somu fatan viðvíkjandi endamálum og leiðum, sum til ber at ganga.

[4] Undirstøðukervi merkir her: 1) Flutningskervi (t.e. flutningsskipanir [transmissiónsskipanir], fipurkaðal radioskipanir, sjókaðal o.a.). Flutningskervið verður nýtt til fjarskifti ímillum telefonstøðir. 2) Atgeingiskervið (t.e. koparnet og ymiskar atgeingisskipanir, ið byggja á radioskipanir. Fipur kunnu í framtíðini væntast at gerast partur av atgeingiskervinum). Atgeingiskervið verður nýtt til fjarskifti ímillum brúkaran og telefonstøðina. 3) Telefonstøðir (t.e. samgildar [analogar]-skipanir og talgildar telefonstøðir, uppi í hesum eisini IP-baseraðar koplingarskipanir, sum kopla linjur og samrøður o.a. saman. T.d. kopla saman atgeingis- og flutningskervið).



# Førleikamenning og gransking

Skal útflutningurin av KT-vørum og tænastum mennast, er tað ógvuliga umráðandi, at útboðið við skikkaðari arbeiðsmegi er nøktandi. Týdningarmesta tilfeingið, ið KT-virki nýta, er vitan, og ein tann størsta avbjóðingin næstu árini er tí at fáa og halda skikkaða arbeiðsmegi í KT-vinnuni. Um allan heim tørvar útbúgvin KT-arbeiðsorka, og í Føroyum kappast virkini beinleiðis við grannalondini um at fáa tey útbúnu fólkini til sín.

Sambært KT-vinnuni í Føroyum er útboðið viðvíkjandi KT-førari arbeiðsmegi ov lítið til at nøkta tørvin, og tað tykist vera ein trupulleiki, at ov fá fáa sær útbúgving, ið gevur KT-førleika. Gransking viðvíkjandi vinnum er eisini ein fortreyt fyri at menna føroyska KT-vinnu. Serliga vinnuvend gransking, sum fæst við at menna KT til alivinnu og fiskivinnu. Føroyingar hava holla vitan um hesar vinnur: Ein kjarnaførleika. Hesin kjarnaførleiki er saman við førleika í kunningartøkni gott grundarlag undir KT-gransking og KT-menning. Tað er avgerandi, at granska verður í at nýta og tillaga kunningartøkni. T.e., at granskingarverkætlanirnar snúgva seg um at nýta teldur og fjarskifti í ymsum samanhangi.

**Endamál:**

- **at útboðið viðvíkjandi KT-útbúnari arbeiðsmegi skal skunda undir at menna føroyska KT-vinnu**

- **at menna undirvísing og gransking í KT og menna gransking í nýtslu og at tillaga KT**

Neyðugt er at gera sær greitt, hvat tað er, sum forðar fólki at nema sær eina KT-útbúgving, og hvat tað er, sum ger tað, at fólk við KT-útbúgving aftra seg við at starvast í føroyskum KT-virkjum ella á føroyskum útbúgvingarstovnum og granskingarstovnum.

Ongar føroyskar kanningar eru gjørdar, hví tilgongdin til KT-útbúgvingar ikki evna at fylgja við tí vaksandi eftirspurninginum. Slíkar kanningar eiga at verða



gjørdar. Kanningar í útlondunum benda tó á, at tann alment minkandi áhugin fyri náttúruvísindaligum og tøkniligum lærugreinum sum heild ávirka. At marknaðarføra KT-útbúgving kann í hesum sambandi gera sítt til, at fleiri fáa kunnleika um møguleikarnar at nema sær útbúgving í KT, og hvørjar vinnumøguleikar ein KT-útbúgving gevur. Vita fólk um teir møguleikar, ið eru at samskipa KT-útbúgvingar[5] við aðrar útbúgvingar, kann tað eisini eggja til, at fleiri fáa sær útbúgving í KT. Ein máti kundi verið at kunnað um møguleikarnar hjá føroyingum at nema sær KT-útbúgvingar bæði í Føroyum og í útlondum, t.d. við einum elektroniskum útbúgvingarmarknaði á einum heimasíðuportali. Ein slíkur marknaður kann eisini gerast gott amboð hjá eitt nú lestrarvegleiðarum í miðnámsskúlunum.

Tekin eru um, at støðugt fleiri fólk, sum fara uttanlands at útbúgva seg, flyta til Føroya aftur, halda tey møguleikarnar og umstøðurnar annars gerast góðar. Aðrar umstøður, sum eisini gera seg galdandi í øðrum vinnugreinum, eru t.d. barnaansing, bústaðarviðurskifti, frítíðartilboð o.a.

Av serligum áhuga í sambandi við ein KT-vinnupolitikk eru tó forðingar, sum eru serstakar fyri KT-vinnuna. Ein tann týdningarmesta forðingin er, at Føroyar í granskingarsamanhangi ikki eru hildnar at vera áhugaverdar, og fakliga umhvørvið verður tí hildið at vera meira avbjóðandi aðrastaðni. Føroyingar við KT-útbúgvingum, sum hava ætlanir um at granska og arbeiða við at menna KT-vørur og KT-tænastur burturav, verða tí verandi uttanlands, og føroysk virki fáa sostatt ikki gagn av serkunnleika teirra. Tann samvirkisvirknaðurin[6] (synergi-effekt), ið KT-virki, KT-granskarar og onnur virki kunnu fáa av at samstarva, kemur ikki føroyska samfelagnum til góðar.

Verður eitt føroyskt granskingarumhvørvi skapt, verður léttari hjá føroyskum virkjum at hava samband við granskarar og lesandi og á henda hátt menna

[5]Nevnast kann sum dømi, at í Danmørk er ein kandidatútbúgving fingin í lag, har lesandi við *bachelor* útbúgving kunnu taka ein KT-yvirbygnað á linjunum: sniðgeving, samskifti og fjølmiðlar, og somuleiðis á linjunum: ritbúnaður, internet-tøkni og margmiðlatøkni.
[6]Samvirkisvirknaður er virknaðurin av tveimum ella fleiri pørtum samanløgdum. Hesin virknaður er størri enn virknaðurin hjá hvørjum parti sær.



møguleikarnar at fáa arbeiðsmegina at støðast í Føroyum, so at førleiki og KT-vørur og KT-tænastur kunnu mennast. Altjóða KT-virki hava sítt granskingar- og menningarvirksemi í londum, sum hava eitt áhugavert granskingarumhvørvi. Skal KT-vinna mennast við stórum virðisvøkstri krevst, at vinnan fær eitt kappingarført umhvørvi at arbeiða í.

Mentamálastýrið hevur í frágreiðingum og í verki virkað fyri, at KT skal verða ein natúrligur partur av gerandisdegnum í skúlanum, soleiðis at næmingarnir fáa góðan kunnleika til KT, ikki einans við undirvísing í KT, men gjøgnum undirvísing við KT. Ein miðvís og samskipað menning viðvíkjandi kunningartøkni í skúlaverkinum er farin fram seinnu árini, soleiðis at næmingarnir so hvørt fáa teir førleikar, ið eru neyðugir. Mentamálastýrð hevur staðfest, at til tess at menna serkunnleikan í kunningartøkni sum heild í samfelagnum, er neyðugt at hava hægri útbúgvingar á hesum øki (sí í hesum viðfangi eisini álit frá Mentamálastýrinum »Til menning og til mátt – kunningartøkni í ungdóms- og framhaldsútbúgvingunum« www.mms.fo).

Føroya Handilsskúli bjóðar útbúgving, ið varir 2 1/2 ár til teldustøðing (datamatikara), ið serliga leggur seg eftir nýtsluskipanum í vinnulívi og umsiting.

Á Fróðskaparsetrinum er ein ætlan um eina BS-útbúgving í kunningartøkni. Hon verður skipað sum framhaldslestur hálva arbeiðstíð í 2 1/2 ár. Henda útbúgving hevði givið teldustøðingunum góðar møguleikar at fingið BS-prógv, umframt at hon kundi verið ein góður møguleiki hjá fólki við samsvarandi fortreytum, ið longu eru í t.d. KT-vinnuni, at ment sín fakliga førleika. Í sambandi við ætlaðu BS-útbúgvingina er ætlanin at skipa ein fylgibólk, ið undirvísarar og granskarar á hægri lærustovnum í útlondum og umboð fyri KT-vinnuna í Føroyum manna. Annars er á Fróðskaparsetrinum møguleiki at fáa BS í teldufrøði, sum er framhaldslestur í 1 ár. Tá hava hesir næmingar fingið náttúruvísindaliga støðisútbúgving í 2 ár.



Neyvt samstarv eigur at vera millum fyritøkur og Fróðskaparsetrið, t.d. at samstarv er um granskingarverkætlanir, og at fólk í vinnuni undirvísa á setrinum.

Stórur dentur eigur at verða lagdur á at fáa í lag altjóðasamstarv við aðrar undirvísingarstovnar. Slíkt samstarv kundi borið í sær, at undirvísarar av útlendskum lærustovnum tóku partar av undirvísingini upp á seg. Slíkt samstarv kann eisini vera samstarv um granskingarverkætlanir tvørtur um landamørk og millum hægri lærustovnar. Fyri at menna granskingarumhvørvið á altjóðastigi og skapa eitt fakliga spennandi umhvørvi er neyðugt, at stovnurin mennir samstarv við KT-granskingardeplar á altjóðastigi.

**Vegir at røkka endamálinum eru, at:**

- menna KT-útbúgvingar á hægri stigi á Fróðskaparsetri Føroya. Sum skjótast eigur at verða farið undir at bjóða BS (*bachelor)* í kunningartøkni og at fyrireika fulla kandidatútbúgving

- granskarar verða knýttir at Fróðskaparsetri Føroya í samstarvi við vinnuna, og skipað verður fyri sergreinalestri t.d. sum PhD-lestur

- Føroya Handilsskúli framhaldandi bjóðar útbúgving til teldustøðing og datanom

- hildið verður fram at fyrireika KT-útbúgvingar á Teknisku skúlunum, m.a. eina KT-support útbúgving[7]

- dentur skal verða lagdur á, at útbúgvingar í kunningartøkni verða skipaðar soleiðis, at tær eisini eru ein áhugaverdur eftirútbúgvingarmøguleiki. Í hesum sambandi kann fjarlestur[8] verða nýttur m.a. soleiðis, at fólk kring alt landið kunnu fylgja ávísum skeiðum, og at eftirútbúgvingar kunnu skipast í samstarvi við útbúgvingarstovnar uttanlands

[7]Til upplýsingar um KT-support-útbúgving hygg á http://www.industriensuddannelssguide.dk.
[8]Menningin á samskiftisøkinum seinastu árini hevur givið vónir um at fáa gongd á fjarundirvísing, men higartil hava at kalla ongar veruligar royndir verið gjørdar í Føroyum á hesum øki. Sum eitt lítið, fjarskotið og landafrøðiliga rættiliga spjatt land við avmarkaðum serkunnleika, er tað sjálvsagt at troyta møguleikarnar í hesum undirvísingarformi.



# Fíggingarmøguleikar og skattaviðurskifti

KT-vinnan er eyðkend av, at høvuðstilfeingið er vitanarkapitalur[9]. Hevdbundin fígging hóskar illa til vitanarvinnu. Fíggingin er tengd at, hvussu fólk, sum starvast á tí einstaka virkinum, eru fyri t.d., hvat útbúgving tey hava. Avleiðingin av, at høvuðstilfeingið hjá vinnuni er í vitanarkapitali, er, at fíggingarstovnar taka ávís fyrivarni, tí at vitanarkapitalur er ikki støðufastur sum annar kapitalur og kann illa verða settur í veð.

Kapitalmarknaðurin í Føroyum er ikki nøktandi, tá ið talan er um váðafúsan kapital til nýggjar vinnur. Tørvur er á vinnufremjandi skipanum, sum stuðla nýggjum slóðbrótandi virkjum og virkjum, sum eru, til at menna KT-vørur og KT-tænastur.

Atgongd til váðafúsan kapital og strategiskar fíggingarsamstarvsfelagar er alneyðug fyri at menna føroyska KT-vinnu.

Landsstýrið heldur tó, at KT-vinnan eins og aðrar vinnugreinir mest møguliga eigur at hava atgongd til fígging á fíggingarmarknaðinum og ikki í almennum stuðulsskipanum.

**Fíggingarmøguleikarnir, sum eiga at verða mentir, eru:**
- ein fjøltáttaður og sterkur kapitalmarknaður
- klekingardeplar (fíggja skrivstovu, ráðgevingartænastur o.a.)
- aðrar vinnufremjandi skipanir

Skattaskipanin kann verða nýtt sum eitt hent amboð í vinnumenning. Í Føroyum eiga skattir og avgjøld sum heild at vera lág og skipanirnar einfaldar, umframt kann skatting verða nýtt strategiskt til tess at náa ávís vinnupolitisk mál. Ansast má eftir, at skattaskipanir í øðrum londum gera ikki tað, at føroyskar

[9] Vitanarkapitalur er at skilja soleiðis, at viðvíkjandi hevdbundnum (traditionellum) vinnum gera fyritøkur íløgur meiri í framleiðslutól, sum t.d. eru tól í samband við framleiðslu, og veitir tað fyritøkuni vøkstur í kapitalvirðunum (støðug framleiðslugøgn). Tá ið talan er um vitanarvinnugreinir, er ein íløga í starvsfólk við vitan vøkstur í kapitalvirðinum í fyritøkuni. Ístaðin fyri at framleiðslugagnið er t.d. eitt tól, er tað eitt fólk við vitan.



fyritøkur verða verri fyri og hava kappingarligan vansa. Dentur verður tó lagdur á einfaldar og alment galdandi skattaskipanir.

**Endamál:**

- **at fáa góðar karmar um fígging**
- **at skattapolitikkurin, uttan at vera avlagandi, kann verða nýttur sum eitt virkið amboð at fáa og halda KT-arbeiðsmegi og KT-fyritøkur í landinum**

Fíggingarmøguleikarnir í Føroyum nú eru í høvuðsheitum: Vinnuframagrunnurin, Framtaksgrunnurin, og bankafígging.

**Eitt dømi kann verða nevnt um fíggingar- og menningarumfør hjá einum KT-virki:**
1. umfari er eyðmerkt við granskingar- ella klekingarverkætlan[10] og verður verkætlanin skipað sum einstaklingavirki ella smápartafelag. Kapitalmarknaðurin til 1. umfar er íbirtingarkapitalur[11], eginfígging og vinnuframafígging.
2. umfar er eyðmerkt við framtak og verður skipað sum eitt partafelag. Kapitalmarkaðurin til 2. umfar er framtaksfígging.
3. umfar er eyðmerkt við vøkstur og rakstur og verður skipað sum eitt partafelag. Kapitalmarknaðurin er virðisbrævamarknaður, lánsbrøv og bankafígging.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur sett eina KT-vinnuframaverkætlan í verk undir KT-ætlan Vinnumálastýrisins. Talan er um eina royndarverkætlan, ið hevur sum endamál at skapa serligar karmar um menning viðvíkjandi nýggjum KT-fyritøkum, t.e. geva teimum virkisligar karmar og gera tað lættari hjá teimum at fáa fígging og ráðgeving í byrjanartíðini, til fyrsta fíggingarumfar í verkætlanartilgongdini við tí máli at gera teirra tøkniligu menningarhugskot

[10] Kleking er á enskum »Incubator« og merkir íbirtari. Ein klekingardepil merkir her eitt umhvørvi, har endamálið er at geva vinnu-íbirtarum góðar umstøður at mennast í fyrsta menningarumfarinum, tá ið hugskot verða ment til vørur og tænastur.
[11] Íbirtingarkapitalur er á enskum »Seed capital«.



búgvin at verða handlað við. Málbólkurin er íbirtari at stovna egið virki, sum skal handla við nýggjum hugskotum um nýskapandi kunningartøkniligar vørur ella tænastur til úflutnings.

Íbirtarin skal menna hugskotið soleiðis, at vøran kann verða allýst (definerað) og tøkniliga standa marknaðarkrøv. Eitt frumeintak (prototypa) ella frumsmíð (working-model) skal verða gjørt, og handilsætlan skal vera tøk. Verkætlanin skal verða búgvin til handilsliga og/ella strategiska íløgu.

Tá ið royndartíðin er av, skal setta stýrið fyri depilin lata landsstýrismanninum skrivliga frágreiðing og eftirmeting við tilmæli møguliga um broytingar í reglugerð, og um hvussu deplar kunnu verða skipaðir aðrastaðni í Føroyum. Í hesum førum eisini meta um, antin vinnan t.d. við ávísum almennum parti kann standa fyri deplum ymsastaðni í Føroyum, eisini í øðrum hátøknivinnu-greinum, t.d. fiskivinnutøkni, biotøkni o.ø. T.e., at lokalir myndugleikar, vinnulívsfólk á staðnum, undirvísingarstovnar og Vinnumálastýrið samstarva um at menna hátøkniklekingardeplar í Føroyum.

Tørvur er á íbirtingargrunnum á føroyska kapitalmarknaðinum, sum kunnu gera íløgur í verkætlanir í 1. fíggingarumfari, t.e. fíggja ta fyrstu tíðina, meðan eitt hugskot verður evnað til.

Løgtingið hevur samtykt lóg um Vinnuframagrunn til at styrkja og fjøltátta føroyskt vinnulív og menna burðardyggar føroyskar fyritøkur. Grunnurin skal virka samsvarandi vinnupolitikki landsins og annars innan tær avmarkingar-nar, ið settar verða í hesari lóg, og tær avmarkingar, ið altjóðasamvinnulag til eina og hvørja tíð natúrliga setur.

Landsstýrismaðurin staðfestir í stuðulsskipanum hvørji endamál, ið Vinnu-framagrunnurin kann stuðla, og undir hvørjum treytum, heruppií hvørji vinnu-



greinaøki kunnu verða stuðlað. Stuðul kann eftir umsókn verða veittur fyritøkum til tiltøk, sum við framtíðini í huga gera kappingarevnini betri ella økja um altjóðageringina hjá fyritøkunum. Grunnurin kann eisini stuðla serstøkum vinnuframaátøkum og heildarverkætlanum viðvíkjandi útflutningi, nýskapan, førleikamenning, ferðavinnu og gransking. Við løgtingslóg kann verða gjørt av, at partur av stovnsfænum kann verða nýttur at stovnseta ella týðandi menna vinnulig undirstøðukervi.

Framtaksgrunnurin er vinnurekandi grunnur, ið hevur sum endamál at gera íløgur í nýggj ella víðkað vinnutiltøk í Føroyum. Íløgan hjá Framtaksgrunninum kann verða latin sum innskot í eginogn ella sum ábyrgdarlán, og skulu íløgurnar hava langtíðar kapitalágóða, ið stendur mál við váðan. Íløgur, ið verða gjørdar, skulu sostatt verða grundaðar á eitt handilsligt grundarlag, har útlitini eru góð fyri nógvum vøkstri. Verkætlanir, Framtaksgrunnurin ger íløgur í, skulu vera komnar so væl áleiðis, at tær eru búnar at seta í verk.

Framtaksmarknaðurin er nú altjóðagjørdur, og framtaksfeløg um allan heim sóknast eftir samstarvsfeløgum. Slík framtaksfeløg eiga at fáa høvi at gera íløgur í føroyskan framtaksmarknað. Samstarv tvørtur um landamørk mennir vitan og marknaðaratgongd, og váðin kann spjaðast sundur.

Umframt framtaksfeløg, ið veita fígging, tróta íleggjarar, ið virka sum strategiskir samstarvsfelagar, og sum arbeiða ógvuliga væl saman við virkjum og hjálpa á øllum stigum í virkismenningini frá hugskoti til sølubúna vøru og somuleiðis í sambandi við marknaðaratgongd. T.e. m.a.:

- at hjálpa virkjum at orða eina handilsætlan
- at fáa samband í lag við marknaðarserkøn og íleggjarar
- at hjálpa at skipa leiðslu
- at stovna altjóðaskrivstovur



Í royndum sínum at fáa og halda arbeiðsmegi hava onnur lond skipað serliga skatting viðvíkjandi forkeypsrætti (option). Forkeypsrættur merkir, at starvsfólk hava rætt, men ikki skyldu innan ávísa tíð at keypa partabrøv í virkinum fyri ein kurs, ið er ásettur frammanundan.

Søla við tekningarrætti til partabrøv og eitt nú partabrævarætti verður skattliga viðgjørd eftir vanligu reglunum í skattalóggávuni, við tað at serreglur eru ikki um, hvussu nevndu rættindi (ognir) kunnu verða seld. Verða ognir útvegaðar sum gáva, undantikið í teimum førum, tá ið nær skyld ella næstingar lata gávuna, verður gávan roknað upp í skattskyldugu inntøkuna hjá tí, ið fær gávuna í tí ári, gávan er givin. Tað merkir, at soleiðis sum skattareglurnar eru háttaðar nú, verður partabrævaforkeypsrættur (option) skattaður, tá ið hann verður latin starvsfólkunum, og tá ið forkeypsrætturin verður seldur[12].

Bygt verður á, at høvuðstilfeingið at menna KT-vinnu er vitan. Til tess at fáa og halda útlendskar granskarar og undirvísarar í føroysku vinnuni, verður hildið, at tað er neyðugt, at hesi fólk verða skattað lagaliga.

**Vegir at røkka endamálinum eru, at:**

- skipa klekingardeplar í Føroyum
- skipað verða framtaksfeløg og íbirtingarfeløg við almennum og mest privatum íleggjarum, ið hava sum endamál at seta váðafúsan kapital í nýskapandi vinnuverkætlanir á byrjanarstigunum
- ein virðisbrævamarknaður verður skipaður sum skjótast, sum er ein leið at fáa til vega váðafúsan kapital

[12]Við Lov nr. 1285 af 20/12/2000 *om ændring af aktieavancebeskatningsloven og dødsboskatteloven* eru reglurnar at skatta partabrævaforkeypsrætt (aktieoption) i Danmørk broyttar soleiðis, at tú bert verður skattaður, tá ið partabrævaforkeypsrætturin verður seldur.



- skipað verður fyri, at partabrævaforkeypsrættur (optión)[13] og starvsfólka-partabrøv[14] verða skattað lagaliga við tí fyri eyga  at fáa og halda KT-arbeiðs-megi í Føroyum. Starvsfólkini fáa á henda hátt lut í vøkstrinum hjá virkinum og gerast av tí virknir íleggjarar. Partabrævaforkeypsrætturin (option) eigur at vera skattaður, tá ið hann verður seldur

- útlendskir granskarar og serfrøðingar fáa skattalætta tey fyrstu árini, teir starv-ast í Føroyum, um teir gera granskingar- og menningararbeiði

## Fjarskifti og undirstøðukervi

Menningin viðvíkjandi KT-vinnuni er nógv treytað av, at samskiftistænastur eru ógvuliga góðar, og at brúkskostnaður ikki aftrar brúkaran frá at nýta til fulnar teir møguleikar, sum kunningartøknin gevur. Vilja føroyingar gerast partur í altjóðagerð í búskapi og kunningartøkni, er ein fjarskiftismarknaður skipaður eftir megintættunum í Evropa, ein týðandi fortreyt fyri at bøta um kappingarføri okkara. Allir brúkarar í Føroyum eins væl einstaklingar sum virki og almennir stovnar skulu fáa høvi at gerast partur í einum samantiknum og skipaðum teldutykissamfelagi[15] við háferðarkervum og  einum kostnaðar-grundarlagi, ið skal verða ájavnt við ella lægri enn í oddalondunum í vestur-heiminum.

Tað er umráðandi, at Føroyar framvegis verða ein opin marknaður, og at roynt verður at kappast. Kappingin fer at hava við sær, at útboðið við veitingum verður meiri og betri, so at vinnan kann fáa sergjørdar og tillagaðar skipanir

[13]Ein partabrævaforkeypsrættur (optión) er rætturin til einaferð í framtíðini at keypa partabrøv í einum virki fyri ein frammanundan avtalaðan kurs. Í t.d. USA er vanligt, at nýggj virki partvíst løna starvsfólki við slíkum forkeypsrætti, tí virkini enn ikki eru før fyri at bjóða ta marknaðarløn-ina, ið summi starvsfólk og serráðgevar krevja. Meiri virðið á virkinum hækkar, tess meiri fáa starvsfólkini burtur úr forkeypsrættinum.
[14]Virkið letur ella selur starvsfólkunum partabrøv fyri ein lagaligan kurs, og tey kunnu selja tey aftur eftir ávíst áramál.
[15]Tykissamfelag er heitið fyri samskipanar-felagsskapum. Tykissamfelagið ger, at fók nær og fjar um kunningartøknina  sjálvboðin,  av ymiskum orsøkum og við ymiskum endamálum, samskifta og knýta egin bond.



við serligum avsláttrum. Royndir aðrastaðni vísa, at jú meiri kapping, tess meiri ferð kemur á menningina. At røkka hesum máli er neyðugt at bera so í bandi, at kapping alsamt eggjar fjarskiftisveitarum at bøta um tænastur sínar og til at brúka tilfeingið á skilagóðan hátt.

Marknaðurin skal sjálvur gera av, hvør tøkni, ið hóskar best bæði viðvíkjandi dygd og skjótleika. Tøknimenningin saman við eftirspurninginum fer at hava við sær, at tey ymsu samskiftissløgini renna saman í eina felagstøkni, ið er ljóð, myndir, skrift og tala.

Skal ein KT-vinna mennast í Føroyum og vera før fyri at veita KT-tænastur á altjóðastigi, er tað ein fortreyt, at fólk og fyritøkur eru í einum netsamfelagi, har rásarúm er fyri nýggjum tonkum og hugskotum, og góðir karmar eru at virka í. Góðir samskiftismøguleikar í øllum pørtum í samfelagnum eru bráðneyðugir, skal hugsjónin um kunningarsamfelagið gerast veruleiki.

At nýggir veitarar frítt kunnu leggja egnan kaðal ella seta upp luftborið kervi, er týdningarmikið, tí kervið hjá Føroya Tele tá nýtist betur, umframt tað, at vinnan fær fleiri valmøguleikar. Hetta fer óivað eisini at stimbra til eina víðfevnda menning á økinum, og at útboðini til gagns fyri KT-vinnuna eru víðfevnd. Samstundis eru góð útlit fyri, at so hvørt, sum tøknin tekur seg fram, og kappingin veksur, fara tænastur til útjaðaran eisini at batna. Tøkniligu framstigini gera, at kostnaðurin, sum stendst av at røkka teimum seinastu 10% av brúkarunum, lækkar alsamt. Eisini kann verða víst á, at útoyggjar, kommunur og eigarafeløg annars kunnu skipa seg á slíkan hátt, sum roynt hevur verið við verkætlanini Tykissamfelag – Svínoy og Fugloy. Aðrastaðni, í t.d. Íslandi og Danmørk, hava kommunur og eigarafeløg saman við fjarskiftisveitarum tikið stig til at bjóða sínum borgarum, virkjum og almennum stovnum atgongd til breiðbands-internetsamband[16]. Meiri enn triðingurin av húskjunum í Dan-

[16]Breiðbandskervi merkir her flutningsferð yvir 2 Mbit/s. Háferðarkervi merkir møguleiki fyri flutningsferð úr 128 kbit/s uppi í 2 Mbit/s. Í summum londum er greiningin øðrvísi, t.d. er tað vanligt í USA at nevna flutningsferð størri enn 128 kbit/s breiðband.



mørk, sum fáa sjónvarp við felagsantennu, fær eisini internet ígjøgnum hesa skipan.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum miðar eftir, at tilgongdin at gera fjarskiftismarknaðin frælsari skal halda fram til frama fyri vinnu og borgara. Gott og trygt fjarskifti, og fjarskifti til lagaligan prís saman við størri útboði við føroyskum innihaldstænastum á internetinum eru m.a. fortreytir til tess at menna Føroyar sum kunningarsamfelag. Saman við tí at menna undirstøðukervið er tað eisini neyðugt, at fólk hava álit á internetinum, og at áhugaverdar tænastur verða bjóðaðar fram.

**Endamál:**

- **at menna netsamfelagið Føroyar soleiðis, at øll húski, virki og almennir stovnar hava atgongd til háferðar- og/ella breiðbandsfjarskiftiskervi innan 2004**

- **at menna føroyska fjarskiftisvinnu**

Við fjarskiftislógini frá 1997 varð stevnt ímóti stórum broytingum í fjarskiftisskipanini í Føroyum. Einkarrætturin, sum Telefonverk Føroya Løgtings higartil hevði havt, varð avtikin, og kapping var annar tráðurin í lógini. Lóggávan er í høvuðsheitum gjørd eftir fyriskipanunum í ES (Evropeiska Samveldið). Í Føroyum byrjaði henda tilgongdin heldur seint, sammett við londini í EBS (Evropeiska Búskapar Samstarvið), men nú er komið væl áleiðis, bæði tá ið talan er um tøkni og prísir.

Politikkurin hjá landsstýrinum hevur síðani apríl 1999 verið ein »fyrri var, fyrri fær«-politikkur[17]. Eftir tilmæli frá Fjarskiftiseftirlitinum gevur landsstýrismaðurin umsøkjara, ið lýkur tilskilað grundkrøv, koncessión. Grundkrøvini,

[17]Fyrri var, fyrri fær er á enskum »First come-first served«.



sum Fjarskiftiseftirlitið setur, eru flokkað i fimm flokkar, alt eftir tænastuslagi og  kervi, søkt verður um.

Síðani í mai 1999 eru fleiri koncessiónir latnar til telefontænastur, fartelefon-tænastur,  leigulinjur, tekst- og teldusamskiftistænastur, fylgisveinatænastur og aðrar virðisskapandi tænastur, internettænastur uppií.

3 koncessiónir eru veittar til kringvarpsvirksemi.

Við tí endamáli at skapa góðar fortreytir fyri útbreiðslu við interneti til allar føroyingar hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum gjørt av at geva kommun-um, eigarafeløgum o.t. loyvi at reka fjarskiftiskervi á tilskilaðum økjum og at veita avmarkaða fjarskiftistænastu ígjøgnum kaðal, luftborin flutningskervi ella kringvarpskervi (hybridnet).

**Dátuflutningur, leigulinjur við undirstøðukervi og internettænastur o.a.**
Á hesum økinum eru Føroyar, hvat útboði, flutningsferð og kostnaði viðvíkur, heldur aftarligari enn grannalondini, bæði tá ið tað snýr seg um at binda saman deildir hjá sama virki ella stovni,  og tá ið tað ræður um at veita teldusam-skiftistænastur til sjálvstøðugar eindir. Kappingin fer tó væntandi at menna út-boðið, elva til lægri kostnað og skjótari dátuflutning.

Kappingin kann stimbrast við at gera nýggj undirstøðukervi, har framkomnar loftbornar skipanir verða brúktar. Nýggju veitararnir hava tikið ímóti hesi av-bjóðing og eru partvíst longu farnir at fáa sær sínar egnu loftbornu skipanir.

**Fastnetsamskifti innan- og uttanlands**
Príslegan í Føroyum fyri uttan- og innanlandssamskifti er á leið líka góð sum í øðrum londum í Evropa. Tó soleiðis at Føroyar liggja í hægra lagi tá innan-landasamrøður umræður.



**Farfjarskiftisskipanir GSM, UMTS o.a. til talu og dátusamskifti**

Tøknin tekur seg alsamt fram, og gongdin næstu árini fer at hava við sær, at møguleikarnir í teirri tøkni, sum er, fara at gerast fleiri. Harafturat verða tænasturnar so við og við tøkar kring landið. GSM-tøkni (Global System of Mobile Communications), sum er, fær væntandi víðkað undirstøði, ið nevnist GPRS (General Packet Radio Service). GPRS er soleiðis háttað, at tað altíð ber til at vera á t.d. internetinum  og fáa teldupost sendan beinleiðis til fartelefonina, og at neyðugt er ikki at ringja upp. Seinkingar hava verið í arbeiðinum at menna UMTS (Universal Mobile Telecommunications System)-skipanina, og hildið verður, at fyrstu UMTS-skipanirnar koma í nýtslu 2002/2003. GSM tøknin, sum er, verður nevnd 2. ættarliðstøkni,  UMTS  3. ættarliðstøkni. Í løtuni verða nógvar GSM skipanir í Evropa uppgraderaðar við GPRS  tøkni. Henda tøknin er eitt millumstig millum GSM og UMTS og hevur fleiri av somu møguleikunum, men er tó ikki líka skjót og kann heldur ikki brúkast í líka nógvum londum sum UMTS, ið verður ein alheimsskipan.

Fartelefoniskipanirnar hjá Føroya Tele eru framkomnar og virka væl. Hvat prísum viðvíkur, so liggja Føroyar í hægra lagi. Landsstýrismaðurin hevur veitt tvær aðrar koncessiónir til farfjarskifti – P/F Kall og P/F TeleF. Væntandi verður kapping á farfjarskiftisøkinum í 2002.

Viðvíkjandi UMTS, so ætlar landsstýrismaðurin at fylgja gongdini úti í heimi og fer væntandi í 2002 at loyva umsóknum til UMTS.

**Fjarskiftissambandið við útheimin**

Samskiftissambond Føroya við útheimin eru tvey sløg: gjøgnum sjókaðal ella um fylgisvein.

Gjøgnum kaðal fáa fjarskiftisfeløgini flutningsorku úr CANTAT-3-sjókaðalskipanini[18], ið liggur úr Kanada um Ísland, Føroyar, Danmørk til Bretlands.

[18]CANTAT-3 er eitt samtak,  ið Teleglobe, BT, Iceland Telecom, Tele Danmark o.o.  eiga.



Viðvíkjandi fjarskiftum um fylgisvein skal viðmerkjast, at Føroya Tele í løtuni er einasta fyritøka, ið hevur jarðstøðir til fjarskifti um fylgisvein.

Arbeitt verður í løtuni við at kanna møguleikarnar við nýggjum kaðali í norðurhøvum millum Ísland og Skotland, umvegis Føroyar og møguliga Hetland og oljuøki í Hetlandsrennuni.

**Útlendskir íleggjarar**

Politikkurin er, at ongar avmarkingar eru hjá útlendskum kapitali og fyritøkum at gera vart við seg á fjarskiftisøkinum í Føroyum. Sostatt stendur útlendskum fyritøkum frítt at seta pening í fyritøkur, sum hava koncessión, ella at seta fyritøkur á stovn í Føroyum.

Alt eigur at verða gjørt at tryggja framhaldandi íløgur í fjarskifti í Føroyum, soleiðis at marknaðurin verður áhugaverdur. Tað kann hugsast, at Føroyar t.d. kunnu gerast ein royndarmarknaður í sambandi við KT, tí at Føroyar eru eitt upp á seg lítið, men framkomið samfelag, eitt mikrokosmos nevnt.

**Føroya Tele**

Tað, sum eyðkennir Føroya Tele afturímóti øðrum fjarskiftisveitarum í Føroyum, er, at Føroya Tele er eitt alment partafelag, og áður var eitt einkafelag á fjarskiftisøkinum. Tá ið Føroya Tele varð umskipað til alment partafelag í januar 1998, fekk felagið fjarskiftiskervið í Føroyum til ognar. Hesi viðurskifti geva Føroya Tele eina serstøðu á føroyska fjarskiftismarknaðinum.

Føroya Tele hevur sum kerviseigari kappingarligar fyrimunir afturímóti nýggjum fjarskiftisveitarum og er umframt at vera fjarskiftistænastuveitari eisini kervisveitari. Hetta merkir, at aðrir fjarskiftisveitarar fáa atgongd til kervið hjá Føroya Tele eftir avtalu og gjalda fyri at brúka tað.



**Vegir at røkka endamálinum eru, at:**

- Fjarskiftispolitikkurin byggir á ein marknaðargrundaðan politikk, har íløgur í undirstøðukervið fara fram á privata marknaðinum. Tað almenna skapar karmarnar og skal tryggja kapping við m.ø. krøvum um:

  **A**. roknskaparreglur, ið skulu skapa gjøgnumskygni yvir inntøkur og útreiðslur á ymisku virkisøkjunum. Í flest øllum koncessiónum, ið higartil eru latnar, eru reglur, ið tryggja, at feløgini hava ein sundurgreinaðan og gjøgnumskygdan roknskap

  **B.** meginreglur um at sambinda og samskipa almennar fjarskiftiskervi og almenna fjarskiftistænastur.

  **C.** prísáseting – í koncessiónunum eru eisini reglur, ið tryggja, at veitararnir gera eftir meginreglunum um kapping, hvat prísáseting á tænastum viðvíkur. M.a. at forða fyri okursprísum, ránsprísum[19] og krossstuðli[20] millum virkisøkir

- sambært lóg um fjarskifti hevur landsstýrismaðurin heimild til at áleggja fjarskiftisveitarum veitingarskyldu. Í koncessiónini hjá Føroya Tele er ásett, at felagið hevur avmarkaða veitingarskyldu[21] til tess at tryggja útjaðaranum fjarskifti. Landsstýrismaðurin í vinnumálum kann eisini áleggja øðrum fjarskiftisveitarum veitingarskyldu, gerast teir týðandi veitarar

[19]Ránsprísir er heiti fyri marknaðarframferð, tá ið talan er um sera harða og ráa prísáseting, sum ein týðandi veitari á marknaðinum setur, og sum tilvitað setur penning til við tí í hyggju at kroysta kappingarneytar av marknaðinum.
[20]Krossstuðul lýsir eina støðu, har ein týðandi vinnufyritøka á einum marknaðarøki samfelt og í longri tíð setur pening til einum virkisøki frá einum øðrum virkisøki fyri at dekka undirskot ella fyri at skúgva aðrar kappingarneytar út av einum marknaðarøki ella einari vøru.
[21]Undir veitingarskyldu eru telefoninet og undir tí telefonitænastur. Undir hesum at kunna senda og taka ímóti faxum og atgongd til lágorkuskjalaflutning t.d. uppringt internetsamband gjøgnum mótald. ISDN-net og undir tí ISDN tænastur innan 2001-12-31 (tó við tí fortreyt, at í minsta lagi 10 hava biðið um tænastuna í ávísari bygd í einum tíðarbili, sum er 6 mánaðir). Eisini er veitingarskyldan hjá Føroya Tele at veita deyvum gjøllari ásettar fjarskiftistænastur.



- landsstýrismaðurin í vinnumálum tekur eintáttaða samband Føroya við útheimin í størsta álvara og fer framhaldandi at raðfesta týdningin, fjarskiftissambandið við útheimin hevur, sum ein part av geostrategisku áhugamálum Føroya

- landsstýrismaðurin í vinnumálum ætlar at fáa útlendskar eins væl og føroyskar fyritøkur og íleggjarar inn á tann føroyska fjarskiftismarknaðin og soleiðis m.a. gera tann føroyska fjarskiftismarknaðin alheimsskipaðan og tryggja, at íløgur verða gjørdar í føroyska fjarskiftiskervið og tænastur í framtíðini

# Netverksskipanir og marknaðarføring uttanlands

Eitt netverk er fyritøkur, stovnar og einstaklingar á einum virkisøki og innanhýsis sambandið millum teirra. Vitanarsamfelagið er eyðkent av, at vitanin er ikki miðsavnað. Tann nógva vaksandi upplýsingin ger, at einstakt fólk ella virki kann hava yvirlit yvir ella vita um allar broytingar á sínum virkisøki. Eitt væl skipað netverk ger brúkaran føran fyri at leita sær upplýsingar og samskifta um gongdina á virkisøkinum, ið kann ávirka vinnumøguleikarnar. Eisini kunnu vælskipað netverk tryggja, at sambandið við samstarvspartar verður hildið og ment, so samstarv kann spyrjast burtur úr øllum pørtum til gagns. Felags fyri netverk er hugsjónin um, at heildin er størri enn partarnir allir tilsamans.

**Endamál:**

- **miðað verður eftir at menna karmarnar um netverksgerð**

Havdur skal vera í huga týdningurin, sum netverk longu hava og ikki minst fara at hava fyri ein sjálvberandi búskap í Føroyum, tí áliggur tað landsstýrinum at leggja viðurskiftini fyri netverksgerð so væl til rættis, sum til ber. Leikluturin hjá tí almenna er ikki at koma sær upp í persónligt samskifti ella netverk hjá fólkum ella fyritøkum, men at tryggja, at eitt samskifti kann verða. Umráðandi



er, at vinnan sjálv hevur áhuga í og tekur stig til at menna netverk, um slík netverk verða skipað.

KT-felagið er áhugafelag, stovnað í 2000. Tað hevur til endamáls at menna áhugamál hjá KT-vinnuni. Nú eru 20 virki limir í felagnum. Undir KT-ætlan Vinnumálastýrisins hevur samstarv verið við KT-felagið um tvær verkætlanir. Onnur er at skipa ein føroyskan internetumskiftisdepil[22] og hin at skipa eina føroyska umsiting viðvíkjandi økisnavninum .fo á internetinum [23]. Somuleiðis er KT-felagið umboðað í stýrinum fyri KT-klekingardepilin.

Hugsast kann, at KT-felagið og vinnumenningarstovurnar, Menningarstovan og TK Stovan, gera serlig átøk KT-vinnuni til frama, t.d. luttøku á Cebit[24], og kunna KT-vinnuna um, hvørjar útflutningstænastur stovurnar veita.

**Vegir at røkka endamálinum eru, at:**

- netverk verða ment millum útbúgvingarstovnar og KT-vinnu við tí fyri eyga at skapa ein samvirkis-virknað (synergi-effekt) millum útbúgving, gransking og vinnu

- ment verða netverk í vinnuni í Føroyum. Heldur enn at avmarka seg til at síggja onnur virki á heimamarknaðinum sum kappingarneytar, so skal høvuðsdenturin verða lagdur á tann støðugt vaksandi marknaðin úti í heimi og teir fyrimunirnar, sum eru við at samstarva fyri at menna marknaðarpartin

- stuðla og stimbra granskingarsamstarv, part á útlendskum framsýningum og at skipa fyri altjóða ráðstevnum og framsýningum í Føroyum

---

[22]Føroyski internetumskiftisdepilin hevur fingið navnið »THOR-IX«. »THOR« stendur fyri Tórshavn og »IX« stendur fyri »Internet Exchange”, stytt og stílført.
[23]Umsitingin viðvíkjandi føroysku økisnøvnunum á internetinum verður í næstum flutt til Føroya. Skipað er eitt FO-ráð, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur staðfest. Ráðið hevur hereftir ábyrgdina av at flyta umsitingina til Føroya og av .fo – umsitingini.
[24]Cebit er ein atjóða-KT-ráðstevna, sum verður fyriskipað annaðhvørt ár, sí annars www.cebit.com.



- KT-felagið er uppi í altjóðasamstarvi t.d. í ISOC[25] (International Internet Society), og at fyrisitingin er við í millumlandasamstarvi fyri á henda hátt at fáa dagførda vitan og at menna netverk

- burðardygt samstarv framvegis verður millum KT-vinnu og fyrisiting í Føroyum

## Almenna KT-nýtslan og lóggáva

Hvussu nógv og á hvønn hátt tað almenna nýtir kunningartøkni í samskiftinum við borgaran og í innanhýsis mannagongdum, kann ávirka nýtsluna og medvitið viðvíkjandi KT í samfelagnum sum heild.

**Endamál:**

- **Tað almenna eigur at ganga á odda at nýta kunningartøkni**

- **Lóggávan skal tillagast einum broyttum umhvørvi, og beinast skulu burtur óneyðugar avmarkingar í KT-menningini og KT-nýtsluni, soleiðis at lógarkarmarnir stimbra undir at menna KT-vinnu**

Tað almenna er ein, ið keypir KT-vørur og KT-tænastur og týðandi partur av heimamarknaðinum hjá føroyskari KT-vinnu. Setur tað almenna sær fyri at menna KT-nýtsluna í samskiftum sínum við borgarar og í innanhýsismannagongdum, skapar hetta ein vaksandi beinleiðis og óbeinleiðis eftirspurning eftir veitingum frá KT-vinnuni. Tann beinleiðis eftirspurningurin eru tær veitingar, sum eru neyðugar hjá tí almenna, til tess at skipanirnar kunnu virka, m.a. netumsiting og forrit. Tann óbeinleiðis eftirspurningurin stendst av, at KT-

---

[25]ISOC er altjóðafelag, sum hevur sum endamál at viðgera og samstarva um framtíðarviðurskifti viðvíkjandi internetinum.



nýtslan í samfelagnum sum heild veksur, um samskiftið millum borgaran og tað almenna meira fer fram við at nýta kunningartøkni.

Ein avgerandi fortreyt fyri, at ein vaksandi eftirspurningur eftir KT-vørum og KT-tænastum á heimamarknaðinum ikki skal elva til minni áhuga at flyta út tænastur, er tó, at fólk verða fleiri, enn tey eru nú við KT-útbúgvingum. Verða KT-útbúgvingarnar harafturímóti mentar, kann ein vaksandi heimamarknaður gerast støðið undir einum vaksandi útflutningi við KT-tænastum.

Avgerðir, um KT-tænastur skulu internaliserast ella verða bodnar út til privat KT-virki at røkja, eru eisini týdningarmiklar fyri førleikamenningina á virkjunum, og um tað er gjørligt at skapa ein KT-útflutning.

Er tað almenna ein vandin keypari og setur krøv til tær tænastur, ið veittar verða, kann ein almenn útbjóðing, har føroysk virki fáa sama møguleika sum útlendsk at bjóða upp á allar uppgávur, gera sítt til til at menna førleikan hjá virkjunum. Tað er týdningarmikið fyri at menna KT-vinnu í Føroyum, at føroysk KT-virki fáa høvi at vera við í tilboðum í sambandi við útboði við almennum KT-vørum og KT-tænastum.

Samsvarandi endamálunum at menna netsamfelagið Føroyar soleiðis, at øll húski hava atgongd til háferðarfjarskiftiskervi innan 2004 og at menna føroyska fjarskiftisvinnu eftir marknaðarligum fortreytum, eigur tað almenna við miðvísum denti á KT og internetgrundaðum tænastum í umsitingini at ganga á odda at brúka ta nýggja undirstøðukervið.

Løgfrøðiliga er samskiftið á internetinum ofta ein trupulleiki, av tí at móttakarin kann ikki vera vísur í, at sendarin veruliga er tann, hann ella hon sigur seg vera. Avleiðingin av hesum er millum annað, at internetið verður lítið brúkt til



bindandi skjøl. Tað kunnu t.d. vera sáttmálar, avtalur, oyðibløð og onnur formlig skjøl. Hetta hóast fyrimunirnir eru nógvir, millum annað við ómakaleysari samskifti, skjótari málsgongd og bíligari umsiting. Samskifti og handil á internetinum gera tað neyðugt at nýta løggilda elektroniska undirskrift[26], og eisini at lóggáva fyriskipar viðurskiftini soleiðis, at ein elektronisk undirskrift hevur sama løggildi sum ein handskrivað undirskrift.

Menningin í elektroniskum handli gongur sera skjótt, men lóggávan hevur lyndi at dragna afturúr. Við tí endamáli at fremja eina ávísa menning kann sjálvfyriskipan koma afturat vanligari lóggávu. Skal tílík regulering virka, er tað kortini umráðandi, at vinnan tekur væl undir við hesum. Nevnast kann, at sjálvfyriskipan verður nýtt í Norðurlondum og úti í heimi t.d. at umsita landaøkisnøvn á internetinum.

Sjálvfyriskipan verður nýtt, tá ið hildið verður, at broytingar á einum øki eru so skjótar, at umsiting og lóggávumyndugleiki eiga at støðga við lógaráseting-um, til marknaðurin er búgvin, t.e., til grundbroytingar eru ikki, sum tá ið marknaðurin enn er óbúgvin, ella als ikki fyriskipar øki. Somuleiðis byggir sjálvfyriskipan á, at partarnir á marknaðinum sjálvir skjótari síggja trupulleikar og avbjóðingar og kunnu taka avgerðir um at handfara tey.

Í Føroyum hevur Vinnumálastýrið saman við KT-felagnum virkað fyri at menna sjálvfyriskipanar-skipanir viðvíkjandi einum føroyskum internetumskiftisdepli (THOR-IX) og føroyskari umsiting viðvíkjandi økisnavninum .fo á internetinum.

[26]ES viðtók direktiv í 1999 um talgildar undirskriftir (Direktiv 1999/93/EF om en fællesskabsramme for elektroniske signaturer). Einstøku limalondini hava síðani sett lóggávu um talgildar undirskriftir í gildi sambært hesum direktivi. Til dømis »Lag (2000:832) om kvalificerade elektroniska signaturer« í Svøríki og »Lov om elektroniske signaturer, Lov nr. 417 af 31. mai 2000« í Danmørk.



**Vegir at røkka endamálinum eru, at:**

- umsitingin skal gerast virknari og leggjast á tann hátt, at nýtslan viðvíkjandi kunningartøkni verður meiri fjøltáttað, tænastustigið verður hægri, og samskiftið við borgararnar verður betri og einfaldari
- orðaður verður ein KT-politikkur fyri fyrisitingina við endamálum og vegir at røkka málunum og serendamálum fyri hvørt fyrisitingarøki sær
- tað almenna heldur seg mest møguliga til at lýsa innihald og dygdarkrøv til KT-tænastur og síðani letur KT- vinnuna loysa tænastuuppgávurnar
- tað almenna skipar ein keypspolitikk, har KT-vinna í Føroyum fær møguleika at geva tilboð uppá KT-veitingar til tað almenna. Alt, ið keypt verður yvir ávíst minstamark, eigur at verða allýst og boðið út. Hetta kann t.d. gerast við at skipa ein elektroniskan marknað, har KT-uppgávur hjá tí almenna verða bjóðaðar út, og við tað at skipað verður ein felags KT-virkisskrá
- til tess at skapa fortreytir fyri at menna samskifti og handil á internetinum skal neyðugt lógargrundarlag fáast viðvíkjandi talgildum undirskriftum. Tað almenna skal ganga á odda at nýta talgildar undirskriftir. Skipaðar verða royndarverkætlanir at fremja hetta í verki
- sjálvfyriskipan skal verða nýtt sum amboð aftur at lóggávu og fyrisiting annars, soleiðis sum neyðuga fyrilitið talar fyri tí



# Hagtøl

Neyðugt er, at landsstýrið við hagtalsgreiningum kann skapa sær neyðugu vitanina at eftirmeta førda politikkin. Hesi hagtøl kunnu m.a. snúgva seg um:

- kunningartøkninýtslu hjá føroyingum
- samanberingar av fjarskiftiskostnaðinum fyri føroyska brúkaran í mun til onnur lond
- virðisøking og roknskapartøl fyri KT-vinnuna
- útflutningsvirði á KT-vørum og KT-tænastum
- útbúgvingarstøði og útbúgvingartørvur í KT-vinnuni



Útgevari: Vinnumálastýrið
Design/umbróting: Vasti sp/f • Filmútkoyring: Repro-Z • Prent: Estra